

**Ábraham og Ísak. 1997-99.**

*Síðani hann fekk sína fyrstu bílegging til at prýða eina kirkju í 1983, hevur Arne Haugen Sørensen verið hugtikin av bíbilskum evnum. Men øvut føroyska listamanninum Torbjørn Olsen, sum fyrst og fremst savnar seg um formligu møguleikarnar í religiøsu myndevnunum, tykist Arne Haugen Sørensen at vera hugtikin av søgunum, boðskapunum og møguleikunum at seta nakrar av lívsins stóru spurningum umvegis listina*

# Eg v

**- Einaferð tók eg eina avgerð. Eg vildi ikki vera sum hesi listafólkini, sum vóru so bangin fyri at liva, at tey lótu sum um tey vóru deyð, eins og summi djór gera. So eg gjørdi alla palettina ljósari og litirnir festligari. Tí man skal liva, meðan man er her - man kann tíðs nokk doyggja, sigur Arne Haugen Sørensen, listamaður millum annað í samrøðu við Inger Smærup Sørensen, listfrøðing**



**Inger Smærup Sørensen**

Verkini hjá Arne Haugen Sørensen tykjast okkum ikki so fremmand við fyrsta eygnabrá. Hóast tað ikki er føroyska landslagið, vit síggja endurgivið, so kenna vit beinanvegin aftur tað ógvusliga og dramatikkin, sterku litirnir og tey máttmiklu penslastrokini frá føroysku listini, og tú kundi lætt ímynda tær, at hesar sterku myndirnar vóru skaptar av einum føroyskum listafólki.

Serstaki mátin at arbeiða bæði figurativt og abstrakt samstundis kann tykjast føroyskur, eins og tokkin til tað sterkt ekspressiva og áhugin fyri andaligu aspektunum í listini saktans kundi verið knýtt at tí føroysku traditiónini.

Men listin kennir nokk ikki til landamørk og landafrøði, tí verkini eru skapt av einum donskum listamanni, sum býr í Spania. Eg havi hitt Arne Haugen Sørensen til eitt prát um hansara list.

*Eg haldi, at tað er okkurt í tínum verkum, sum ger, at tey ikki virka so fremmand fyri ein føroyskan áskoðara. Kennir tú teg sjálvan aftur í føroysku traditiónini?*

- Eg havi jú verið limur í Decembristerne, har Mikines eisini var limur, so eg havi hitt Mikines og fylgt eitt sindur við í føroyskari list. Eg kendi eisini Ingálv av Reyni. So tað er ikki ókent land. Hatta álvarsemi í føroyskari list kenni eg aftur frá mær sjálvum

Men samstundis havi eg sjálvur gjørt uppreistur móti tungu litunum. Eg havi við vilja ljósnað alla palettina ógvusliga, soleiðis at tað faktiskt verður ein kontrast

Sosialurin